# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vón um vending

Herfyri skrivaðu vit, at G20 fundurin London í farnu viku fór at gerast lagnufundur fyri heimin. Vit vístu á tað sama, sum pressan yvirhøvur, nevniliga, at komu eingi úrslit burturúr G20 fundinum, so var lítil vón um, at skeiva búskaparliga gongdin í heiminum kundi vendast til tað betra.

G20 eydnaðist betur enn nakar hevði torað at vóna. Luttakararnir samdust um at loysa fíggjarligu trupulleikarnar í felag heldur enn hvør sær. Henda avgerð skal forða fyri proteksjonistiskum loysnum, ið heldur vaksa enn minka um kreppuna. Hartil samdust luttakararnir um at styrkja altjóða stovnar, ið virka fyri búskaparligum samstarvi og menning. Við hesi fáa IMF og Heimsbankin nógv meira pening at arbeiða við, og hevur hetta sera stóran týdning fyri eitt nú menningarlondini, ið bóru ótta fyri at verða við sviðið soð á G20 fundinum. Við sera góða úrslitinum eru karmarnir fingnir til vega og eftir stendur at fylla hesar karmar og at troyta teir nýggju møguleikar, sum seinasti G20 fundur gevur heiminum.

Tað er breið semja í heimspressuni um, at nýggi amerikanski forestin Obama meira enn nakar eigur heiðurin fyri sera góða úrslitið á Londonfundinum. Tað eydnaðist Obama at sameina tey mongu ymisku áhugamálini, og tað eydnaðist honum at fáa luttakararnar, serstakliga Frakland og Kina, at skilja, at heimurin í dag allur er ein búskapur, og at trupulleikarnir ikki kunnu loysast við búskaparpolitiskum sjálvdrátti men bert við samstarvi, við felags átøkum og felags ábyrgd. Flestu eygleiðarar eru samdir um, at nú eru allar fortreytir til staðar til tess, at heimurin skal kunna sleppa heilskapaður úr hesi álvarsomu fíggjar- og búskaparkreppu, men tilgongdin verður drúgv.

Eftir G20 fundin í London er Obama farin á ferð og hevur hann vitjað í Strasbourg, Prag og í Turkíinum. Vitjanin í Strasbourg skuldi signalera nýggjan amerikanskan áhuga fyri Europa og NATO. Vitjanin í Prag var ein viðurkenning av tí týdningi, sum floyalskolveltingin hevði fyri fólkarræðið, og vitjanin í Turkíinum skal prógva, at Obama veruliga rættir muslimska heiminum hondina. Ferðin hevur stóran áhuga og serstakliga almenna røða Obamas í Prag fyrradagin hevur vakt miklan ans. Endamálið við røðuni tykist vera at siga heiminum frá einum heilt nýggjum uttanríkispolitikki á einum heilt nýggjum ideologiskum og heimspekiligum støði. Kjarnan í boðskapi Obamas á almenna fundinum í Prag var hendan: Higartil hevur uttanríkispolitikkur USA verða grundaður á tað, sum skilir – nú skal hesin politikkur framyvir grundast á alt tað, sum sameinar. Her er veruliga er hent eitt skifti. Frá at síggja heimin mannaðan við fíggindum og yvirgangskroppum skulu vit nú venja okkum til at síggja ein heim, har allar tjóðir hava felags áhugamál. Hesi mál snúgva seg um frið, niðurdubbing serstakliga við atliti at kjarnorkuvápnum, veðurlagsbroytingar og vælferð eisini fyri tær tjóðir, ið eru fyri vanbýti. Her tykist veruliga vera vón um jaliga vending á at kalla øllum økjum.

**Sosialurin**

## Kórsangurin trívist í Eysturoynni

**ÓLAVUR HÁTÚN**



Næstseinasta vikuskifti var tónleikatiltak í Gøtu Kirkju, sum var merkisvert. Tað vóru tey fimm kórini í Eysturoynni Eystanljóð, ið er nýggja heitið á Felagskórinum Gøta-Leirvík, Fuglafjarðar Gentukór, Fuglafjarðar Sangkór, Kór Glyvra Kirkju og Kórið í Fríðrikskirkjuni, sum høvdu funnið saman til kórstevnuhald, ið leygardagin seinnapart endaði við felagskonsert.

Ikki mundi so nógv hava verið gjørt burturúr at lýsa um hesa konsert, og tað mundi vera ein orsøk til, at so fáir áhoyrarar vístu hesum tiltaki tann ans, sum tað hevði uppiborið.

Men íheimligt og sálarkveikjandi var tað at stíga inn undir tað ljómandi kirkjuhválvið, har teir virknu kórleiðararnir í oynni løgdu seinastu hond á stevnuavrikið við tí stóra felagskórinum

Tað var endurfødda Kór Glyvra Kirkju, sum legði fyri á konsertini. Glyvraprestur Meinhard Bjartalíð hevur í ár so mong gjørt vart við seg sum framúr góður hava urguleikari. Nú hann alt meira tekur seg fram sum kórleiðari, er tað ein sonn fragd at eygleiða hansara góða handalag og merkja ríka listarsinnið aftanfyri, soleiðis sum tey eisini komu til sjóndar við teimum báðum vælljómandi kórsatsunum eftir Thomas Attwood, har Jensina Simonsen hevði orgulfylgispælið.

Næst á skránni var Fuglafjarðar Gentukór. Undrunarvert er tað, hvussu Frits Johannesen ár eftir ár hevur megnað støðugt at byggja upp sítt syngjandi gentulið til eina dygd og ein ljóm, sum hevur frøtt hvørt lurtandi oyra, og sum eisini hevur vakt ans uttanlands. Hesa karismatisku megi upplivdu vit í Gøtu Kirkju, nú Frits aftur hevur loyst úr lagdi til eitt framkomið Fuglafjarðar Gentukór av nýggjum.

Eftir felagssálm, har tað var hugaligt at syngja við í hesum ljómlætta kirkjurúmi, trein Kórið í Fríðrikskirkjuni upp á altarsgátt. Toftir við Nesi og Saltnesi hava frá gomlum døgum verið gitnar fyri sína sangmentan. Sprottin úr hesum jørðildi lyfti Hans J. Højgaard í sínari tíð bygdina fram á landsins fremsta pláss við sínum sangkórum. Heppið er tað tí, at so hollur tónleikari sum Mikael Jóhan Heinesen

í seinni tíð hevur tikið um endan aftur og saman við tí eisini tónlistarliga so dugnaliga prestinum Martin Restorff Jacobsen birt lív av nýggjum í hendan sangliga siðaarv í tí fagra kirkjuumhvørvinum í heimbygdini. Hugaligt var tað eisini, at skráin var dygdargóð upprunaførisk.

At bygdirnar Gøturnar og Lorvík hava funnið saman í kommunalum og mentanarligum samstarvi má sigast at vera bæði fyrimyndarligt og stimbrandi. Felagskórið Gøta/Leirvík hevur her gingið á odda, og nýggja heitið Eystanljóð gevur hesari fylking eitt enn lættari flog. Ikki vóru tað lættisoppar, sum kórleiðarin Petur Martin Johannesen hevði lagt fyri sítt kór at framføra; men tað er júst við avbjóðingini, at dygdin mennist, og lítið er at ivast í, at kórið hondunum á so kønum tónleikara hevur vónríka framtíð fyri sær. Petur Martin er professionellur urguleikari, og tað er at ynskja eftir, at slíkur maður sum skjótast fær fast kirkjustarv.

Seinast í røðini av einstøkum kórum var Fuglafjarðar Sangkór. At Fuglafjørður er býur, har tónleikur og onnur list seta dám á, er almannakunnugt. Í kórsanginum er besta støði lagt við frálíku gentukórunum gjøgnum mong ár; men har sum aðrastaðni í landinum man tað m.a. vera ein bági, at ungdómur flytur av bygdini, so hvørt sum hann veksur til, og at grasrótaarbeiðið tí ikki í sama mun gevur ynskiligt endurljóð á vaksnamannastigi. Men eisini við Fuglafjarðar Sangkóri hevur Frits mangan vørrin gjørt bæði burturi og heima, og løtan í Gøtu Kirkju boðaði eisini frá nýggjari menning, nú hann er farin til verka aftur.

Eftir enn ein felagssálm endaði konsertin hábærsliga við tí stóra felagskórinum, har teir luttakandi kórleiðararnir áttu hvør sín tátt í skránni. Ein ríkandi løta var hetta, har kórljómurin streymaði tær fjálgandi í sinnið, og tú kundi ásanna, at neyvan nakað eins og kórsangur kann knýta bond millum menniskjur og skapa vinalag um bygdar- og býarmørk.

## *Í Getsemane garði*

*Í Getsemane garði lá Jesus á knæ,*
*har Hann rópti til Guds og í angist Hann bað*
*»Faðir, tak hesa skál frá mær um tað ber til.*
*Ikki sum eg, men Faðir, sum tú bert tað vil«.*

*Óttin lýsti úr eygunum, blóðsveittin rann*
*ti øll syndin í heiminum tyngdi nú Hann.*
*Einsamallur Hann stríddist meðan verðin øll svav.*
*Á, Hann longdist til Himmals, tá alt her var av.*

*Og Hann leit móti Himni í angist og neyð*
*»Faðir, hjálp mær at vinna á pínu og deyð.*
*Tá ein eingil frá Gudi av Himlinum kom*
*til at ugga og styrkja Guds elskaða son.*

*Í Getsemane garði Hann sorgtungur lá,*
*meðan kærleikans tár runnu kjálkunum á.*
*Tí Hann sá okkum øll ganga glatunar veg,*
*og av kærleika var tað, Hann ofraði seg.*

*Takk, mín Faðir í Himni at kraft tú mær gav*
*til at bera ta byrðu, ið skjótt nú er av,*
*sum tú niður á foldina sendi meg til,*
*nú eg verkið á Golgata fullføra vil.*

Elsa Blicher Christiansen

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.